# Piccadilly Circus

Piccadilly Circus er eitt kent torg og opið øki í West End í London í býnum City of Westminster. Torgið er bygt í 1819 at sambinda Regent Street við stóru handilsgøtuna í Piccadilly. Circus er latínska navnið fyri runding, og tað er júst tað Piccadilly Circus er. Tað er stutt haðani til leikhúsini á Shaftesbury Avenue eins og stutt er til Haymarket á Coventry Street og Glasshouse Street. Eisini er Picadilly Circus nærhendis stór handils- og undirhaldsstøð í West End. Sum eitt týðandi vegamót er Piccadilly Circus vorðið kent sum eitt møtistað og ferðamannamál. Staðið er vorðið kent fyri videosýningar og neonskeltini, eins og fyri Shaftesbury gosvatnið og standmyndina av einum bogamanni kendur sum Eros. Upprunaliga skuldi navnið verða Anteos. Torgið er umgivið av fleiri kendum bygningum so sum London Pavillion og Criterion Theatre. Beint undir torginum er Piccadilly Circus London Underground støðin.




























